## Skúladepilin í Suðuroy reistur

Í morgin, mikudagin klokkan 15, verður hátíðarhald í Skúladeplinum í Hovi í sambandi við, at bygningurin verður reistur. Kristina Háfoss, landstýriskvinna í mentamálum verður til staðar. Úr Suðuroy siga tey, at øll eru hjartaliga vælkomin at vera við til hátíðarhaldið. Klokkan 15 fer Tvøroyra Hornorkestur at spæla. Síðani fer Kristina Háfoss at halda røðu. Leona L. Johannesen, næmingaráðsforkvinna í Miðnámsskúlanum í Suðuroy fer at siga nøkur orð, og Erika Knudsen, næmingarumboð frá Heilsuskúla Føroya, sigur nøkur orð. Jórun Petersen, deildarleiðari, flytir fram røðu vegna nýggja skúladepilin, og síðani spælir Tvøroyarar Hornorkestur aftur. Aftaná verður kaffi og køkur.



# Taks aktar ikki harraboðum

**Hóast Skatta- og avgjaldskærunevndin staðfestir, at Taks ikki kann nokta at viðgera umsóknir um mvg-endurgjald, vil Taks ikki lata nevndina avgera rættarstøðuna hjá somu umsóknum**

MVG
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Her í blaðnum skrivaðu vit í farnu viku um avgerð hjá Skatta- og avgjaldskærunevndini í samband við krav um mvg-endurgjald frá borgara.

Í hesi avgerð staðfesti nevndin, at Taks ikki kann lata vera við at taka støðu til mál, vísandi til, at annað líknandi mál er lagt fyri Føroya Rætt til støðutakan.

### Nokta framvegis

Skatta- og avgjaldskærunevndin er hægsti fyrisitingarligi myndugleiki innan skatta- og avgjaldsøkið. Og hetta viðurkennir Taks í tíðindaskrivinum, sum er sent føroysku miðlunum. Men hóast hetta, so tykist Taks ikki látast um vón, hóast nevndin í tveimum førum hevur givið kærara viðhald í málum um mvg-endurgjald.

»Taks hevur tikið til eftirtektar, at Skatta- og avgjaldskærunevndin hevur heimvíst eitt annað ítøkiligt mál til nýggja viðgerð. Hetta málið verður viðgjørt av nýggjum. Taks tekur tó ikki undir við, at Skatta- og avgjaldskærunevndin hevur heimild til at fastleggja rættarstøðuna í málum, ið ikki eru løgd fyri nevndina til støðutakan.«

Soleiðis verður sagt í tíðindaskrivinum, sum í dag er sent føroysku fjølmiðlunum.

Og hetta merkir, at hóast Taks nú tekur ítøkiliga málið, sum Skatta- og avgjaldskærunevndin viðgjørdi, til nýggja viðgerð, so ber hetta ikki við sær, at Taks fer at viðgera líknandi mál. Í avgerðini hjá Skatta- og avgjaldskærunevndini tann 3. apríl í ár varð annars staðfest, at Taks kann ikki nokta at viðgera eina umsókna vísandi til, at annað mál er lagt fyri Føroya Rætt.




*Taks noktar framvegis at akta Skatta- og avgjaldskærunevndina. Borgarar, sum hava sent inn umsókn um mvg-endurrindan, mugu tí sjálvir senda inn kæru til Skatta- og avgjaldskærunevndina, um umsóknin skal viðgerast*

### Lógarteknískt mistak

Í tíðindaskrivinum vísir Taks annars á, at talan var um lógarteknískt mistak, sum hevur givið borgara rætt til mvg-endurgjald.

Taks vísir í hesum sambandi á, at tað var øllum púrasta greitt, hvussu høgt avgjald ætlanin var at leggja á bilakeyp. Bæði fyri løgtingsfólki, bilahandlarum og teimum borgarum, sum keyptu bil.

» Í uppskotinum er greitt neyvt frá, hvussu skrásetingargjald og meirvirðisgjald skal roknast, og at broytingarnar ikki hava við sær meir ella minni inntøkur til landskassan.«, stendur millum annað at lesa í tíðindaskrivinum, sum Taks í dag sendi út.

# Málini fyrnast

**Taks metir, at krøv um mvg-endurgjald í samband við keyp av persónbili, fyrnast eftir fimm árum. Við øðrum orðum sparir Landskassin á leið 57.000 kr. fyri hvønn dag, sum gongur, uttan at nýggj krøv verða sett fram**

MVG
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Bilakeyparar, sum hava keypt nýggjan bil í tíðarskeiðnum frá 1. mai 1999 til 14. apríl 2003, og ikki longu hava sent inn krav um mvg-endurgjald, mugu ásanna, at tann peningin síggja tey ikki aftur.

Eins og sakførarar, sum vit tosaðu við í farnu viku, so er Taks av teirri áskoðan, at mvg-mál av hesum slag koma undir 5-ára fyrningarregluna.

Lógartekniska mistakið, sum hevur givið borgarum rætt at krevja mvg-endurgjald, var galdandi frá 1. mai 1999 til 28. apríl 2005. Men krøv, sum eru eldri enn fimm ár, eru eftir øllum at døma fyrnað. Hetta er tó ikki galdandi, um bilakeypari hevur gjørt vart við sítt krav, áðrenn bilakeypið var fimm ára gamalt.

Ført hevur verið fram, at talan íalt var um 125 milliónir krónur, sum tað almenna hevur kravt inn, uttan at heimild var fyri hesum. Verður roknað við, at bilakeypið hevur verið javnt øll árini, svarar hetta til 57.000 kr. um dagin. Og hetta er altso upphæddin, møguliga kann fyrnast fyri hvønn dag, sum gongur, uttan at nýggj krøv verða sett fram.

Í spurningingum, sum vit her á blaðnum sendu Taks, varð eisini spurt, um tað hevði áhuga hjá Taks, at málið í Føroya Rætti tekur sum longst av tíð, soleiðis at flest møgulig krøv kunnu fyrnast. Hesum spurningi hevur stovnurin tó ikki svarað.

Vísandi til tað, sum framgongur aðrastaðni her á síðuni, mugu bilakeyparar tó sjálvi ansa eftir, at teirra krøv verða viðgjørd. Tí hóast Skatta- og avgjaldskærunevndin í fyrsta lagi hevur givið borgara viðhald, og í øðrum lagi hevur givið Taks greið boð um at viðgera aðra kæru, so metir Taks altso ikki, at nevndin við hesum avgerð rættarstøðuna hjá málum, ið ikki eru løgd fyri nevndina.

# Tíðindaskrivið frá Taks

**Í samband við at mál um meirvirðisgjald av skrásetingargjaldi av bilum verður umrøtt í fjølmiðlum sendir TAKS út soljóðandi tíðindaskriv:**

MVG
*Tíðindaskriv*

Eitt mál er í løtuni til viðgerðar í Føroya rætti um meirvirðisgjald av skrásetingargjaldi av bili. Skatta- og avgjaldskærunevndin hevur mett, at talan er um eitt lógarteknískt mistak, ið gevur tí borgara, ið kært hevur, rætt til at fáa afturgoldið tann part av meirvirðisgjaldinum, sum er grundaður á skrásetingargjaldið.

TAKS er ikki samt í niðurstøðuni hjá Skatta- og avgjaldskærunevndini og hevur tí kært avgerðina til Føroya Rætt. TAKS viðurkennir, at Skatta- og avgjaldskærunevndin er hægsti fyrisitingarligi kærumyndugleiki innan skatta- og avgjaldsøkið. TAKS hevur tikið avgerðina hjá Skatta- og avgjaldskærunevndini frá 25. oktober 2006 til eftirtektar, og goldið kæraranum meirvirðisgjald av skrásetingargjaldinum aftur við tí fyrivarni, at peningurin verður kravdur aftur, fær TAKS viðhald í Føroya Rætti

TAKS hevur tikið til eftirtektar, at Skatta- og avgjaldskærunevndin hevur heimvíst eitt annað ítøkiligt mál til nýggja viðgerð. Hetta málið verður viðgjørt av nýggjum. TAKS tekur tó ikki undir við, at Skatta- og avgjaldskærunevndin hevur heimild til at fastleggja rættarstøðuna í málum, ið ikki eru løgd fyri nevndina til støðutakan.

TAKS tekur annars bert støðu til ítøkilig mál, ið eru til viðgerðar, og kann tí ikki úttala seg generelt um spurningin.

Viðmerkjast skal eisini, at spurningurin um fyrning verður viðgjørdur eftir galdandi reglum, har fyrningarfreistin sum meginregla er 5 ár. Víst verður annars til § 2 í fyrningarlógini (lov nr. 274 af 22. december 1908 om forældelse af visse fordringer).

Í apríl mánað 1999 samtykti Løgtingið broyting í skrásetingargjaldslógini. Í viðmerkingunum til hesa broyting verður sagt, at endamálið við broytingini er at gera reglurnar lættari at umsita.

Í uppskotinum er greitt neyvt frá, hvussu skrásetingargjald og meirvirðisgjald skal roknast, og at broytingarnar ikki hava við sær meir ella minni inntøkur til landskassan. Roknidømi eru løgd við, ið neyvt vísa hvat skal gjaldast til landskassan í meirvirðisgjaldi og skrásetingargjaldi.

Tað er tí púra greitt, hvussu høgt gjald løgtingsfólk á vári 1999 hava atkvøtt fyri at leggja á bilakeyp. Somuleiðis hevur hetta eisini verið greitt bæði fyri bilahandlarum og teimum borgarum, ið keyptu sær bil.

# Hava goldið út

Í hósdagsblaðnum skrivaðu vit, at Taks ikki hevði goldið borgaranum, sum tann 25. oktober í 2006 fekk viðhald í sínum mvg-kravi, peningin, sum Skatta- og avgjaldskærunevndin segði borgaran hava rætt til.,

Í tíðindaskrivinum, sum Taks sendi út í dag, verður sagt, at »Taks hevur tikið avgerðina hjá Skatta- og avgjaldskærunevndini frá 25. oktober 2006 til eftirtektar, og goldið kæraranum meirvirðisgjald av skrásetingargjaldinum aftur við tí fyrivarni, at peningurin verður kravdur aftur, fær Taks viðhald í Føroya Rætti.«.

Eftir tí, sum Sosialurin hevur fingið upplýst, er hetta útgjald tó farið fram, eftir at greinin stóð í blaðnum.

-mørk